# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Russar og vit

Tað er komið illa við, at Skálaberg nú hevur verið afturhildin í russiskari havn í skjótt tvær vikur. Trolarin varð tikin, tí viðurskifti vórðu umborð, sum russiska eftirlitið ikki helt vóru í lagi. Seinni er komið fram frá føroyskari síðu, at hetta byggir mest á misskiljingar.

Hvussu er og ikki eru vit ikki før fyri at meta um. Men tað kemur sjálvandi sera illa við fyri bæði manning og reiðarí, at skipið verður afturhildið í so langa tíð, ikki minst nú tað skal latast nýggjum eigarum.

Samstarv eisini millum tjóðir byggir á álit og virðing. Tí eiga eisini vit, tá okkurt kemur óvart á okkum og sum vit ikki halda er fair og rætt, at brúka samráðingarvegin. Eru brot á lógir og reglur farnar fram, so eigur hetta sjálvandi at verða handfarið hareftir. Er talan um misskiljingar millum tveir partar, so eigur alt at verða gjørt fyri at byggja brýr aftur og eigur dialogurin sjálvandi at byggja á virðing og verða í einum siðiligum tóna.

Vónandi fær hetta mál eina virðiliga loysn. Hava vit gjørt mistøk eiga vit sjálvandi at bøta fyri tey. Byggja mistøk á misskiljingar, so eiga samráðingarevnini at verða brúkt optimalt.

Vit kunnu so heldur ikki gloyma tann veruleika, at Russland er eitt stórt land, har tingini ikki koyra so skjótt og har uttan iva eisini ymiskar mannagongdir verða brúktar. Vit kunnu so heldur ikki útiloka, at valdsmisnýtsla og møguliga eisini korruptión er partur av mongum málum.

Tí ræður um hjá okkum sum eitt lítið land, sum hevur søguliga traditiónir við samstarvi við russar at telva rætt. Og ein partur av telvingini er fyrireiking og at læra av royndunum og her eisini mistøkum gjørd av báðum pørtum. Vit eiga tí at lurta eftir russiska konsulinum í Føroyum, sum í Sosialinum í dag heitir á løgmann um at bjóða umboðum fyri russiskum sendistovuna í Keypmannahavn til Føroya á vitjan. At fáa gongd á ein siðiligan og gevandi dialog, har tosað verður um tað góða søguliga samstarvið, sum hevur verið millum londini, og at man frá føroyskari síðu ynskir at halda fram við tí og menna tað. Her er ikki bara talan um býti av kvotum og fiskirættindi. Tað snýr seg eisini um samhandil, har vit t.d. selja russum laks og aðra vøru. Og eisini eiga vit at samstarva um annað.

Vit minnast øll, hvussu tað fór kalt niður eftir ryggingum hjá mongum føroyingi, tá russiska eftirlitið eftir vitjan her bráddliga kappaði á stokkinum og setti forboð fyri innflutningi av stórum føroyskum laksi. Hetta er tað, sum kann henda, tá tað ræður um millumlanda handil. Vit fór straks í gongd við tí so týðandi dialoginum, og endin varð, hóast tað tók tíð, at vit innflutningsbannið varð avtikið.

Latið okkum hava virðing fyri russum, og latið okkum umvegis tann góða dialogin royna at fáa russar at hava virðing fyri okkum. Júst nú eru samráðingar um kvotur fyri næsta ár. Her er sjálvandi trupulleikar, og ein er, at antin mugu vit fáa størri toskakvotu frá russum ella mugu teir fáa minni svartkjaft, tí virðisbýtislutfallið millum hesi fiskasløg er so nógv broytt. Hetta er sjálvandi ein barriera, sum vit gjøgnum virðiligar samráðingar mugu loysa upp fyri.

**Sosialurin**

## Takk til Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning

BRYNJÁLVUR H. B. DANBJØRG
Porkeri

Havi sjálvur verið í uttanlandssigling í fleiri ár, so eg var greiður yvir, at hesar hýrur eisini gera mun í tí føroyska lands-húsarhaldinum.

Tá hesar 300 milliónir kr frá føroyingum í uttanlandsvinnu gera so nógv út í tí føroyska lands-húsarhaldinum, **tað annað beini**, nevna tit hesa inntøku. Hvat skulu vit so nevna **»BLOKKIN«**?

Tá 300 mill. kr. hava ringvirkningar sum svara til 700 mill.kr.

Hvat hevði so »Blokkurin upp á 900 mill. kr« av ringvirkningum? Her eru tað milliardir, tað er talan um? So 6% hjá fullveldispolitikarum er bluff! Og idioti!

Hettar havi eg eisini kunna roknað meg fram til, men at fortelja »fullveldis idiotum« hettar ber snøgt sagt ikki til! Teir eru heilavaskaðir?

**Nú manglar bara at gera eina kanning um »BLOKKIN«, eftir sama leisti, sum fyri føroyingar í uttanlanda vinnu.**

Og geva Høgna, Tobba og Annitu hvør sítt eintak, tí rokna duga tey ikki, Annita dugir ikki at rokna %, tá hon úttalar seg um »Blokkin«, og tað duga hinir báðir heldur ikki. Men at skræða gákin duga teir, til UG.

Eg vil nú spentur bíða eftir kanningini um »BLOKKIN«, tað hevði eisini hjálpt fíggjarnevndini við at skilt samanheingi í peningarenslinum í tí føroyska landshúsarhaldinum, til gleði og batan fyri tey veikastu í samfelagnum, sum nú líða undir ódugnaskapinum í fíggjarnevndini. Sum hevur verið við til at skerja »blokkin«, við hjálp frá m.a. javnaðarmonnum.

Ja, skerja »blokkin« uttan at hava minsta hóming av hvat avleiðing hettar hevur fyri samfelagið, bert handla út frá »hugmóð« og undirlutakenslum. - Eftir hugmóð kemur fallið, lærir Halga bók.?

**Her krevst upplýsing oman á upplýsing**

Hvat við at innføra serundirvísing í økonomi til politikararnar. Tað kundi kanska hjálpt at fingið nakrar MVG milliónir inn, í staðin fyri at kroyst tey gomlu og sjúku, eftir teirra seinastu oyrum. Tí sum nú er, er als onki skil, bert glantrileikur, hvar tað kemur út uppá, hvør ið kann lumpa hvønn, og hvør so situr eftir við svarta Per. Beint nú tykist, sum um Javnaðarflokkurin og javnaðarveljarar sita við svarta Per?

## Barnsligu umberingar løgmans

TÓRBJØRN JACOBSEN



Vanvirðing Kaj Leo Johannesens fyri fólkaræðinum er tiltakandi. Ístaðin fyri at taka í egnan barm og viðurkenna sítt stóra mistak, sigur hann seg nú at hava verið á onkrum hissini fundi, sum sambært hansara fatan man hava havt størri týdning enn ein tingfundur, fólkaræðisins evsta bráðpanna, har Føroya løgmaður ætlandi skuldi hava ein aktivan leiklut, hetta tí hann skuldi svara tveimum munnligum fyrispurningum frá Høgna Hoydal, einum frá Karsteni Hansen og einum frá mær sjálvum.

Sum hin forsmáddi avvápnaði drongurin í skúlagarðinum slettir hann nú frá sær ófantaligar ákærir eftir formanninum í Tjóðveldi, Høgna Hoydal. Táið hesin fór av landinum ígjár, í fólkatingsørindum, avráddu vit báðir, at eg skuldi taka yvir hansara leiklut, og spyrja løgmann spurningar hansara. Hesum boðaðu vit løgtingsformanninum frá í góðari tíð. Hetta er vanlig mannagongd og hevur als onki við málið at gera. Tí er vanvirðisliga álopið á Høgna Hoydal eitt somikið bíligt trick, at tað átti ikki at komið einum løgmanni til hugs yvirhøvur.

Aðrir landsstýrismenn gjørdu sína skyldu á tingfundinum ígjár. M.a. svaraði Jóannes Eidesgaard einum fyrispurningi frá Høgna Hoydal, sum undirritaði hevði yvirtikið sambært omanfyrinevndu frágreiðing. At landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í hesum døgum gevur sær stundir at røkja sína fólkaræðisligu uppgávu tænir honum til mikið rós, so mikið álvarsligari er niðrandi attitýdan hjá løgmanni og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum sita eftir við hvør sínum 4 ósvaraðum fyrispurningum, - eftir tingfundin í gjár.

Sum næstformaður Tjóðveldisins taki eg hervið frástøðu frá álopum løgmans, ja, frástøðu frá niðrandi ákærum og grova álopi hansara á formann floksins, sum als onki hald hava í veruleikanum. Hendan primitiva undanførslan hevur undir ongum umstøðum nakran botn, tí beint eftir spurningarnar frá Høgna Hoydal skuldi løgmaður jú svara Karsteni Hansen og undirritaða, og til tað høvið møtti hann heldur ikki.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.